# øld



*Nógv fólk var komið saman í Miðlahúsinum fríggjadagin, og her sita nøkur spent viðhaldsfólk og hyggja í nýggju bókina hjá Suna Merkisstein.*

í 1978. Eftir hetta byrjaði eitt 20 ára tíðarskeið í føroyskum manshondbólti, har Kyndil og VÍF sótu á øllum.

### Óheft av Losjuni

Eftir at Kyndil hevði sett dagsskránna í føroyskum manshondbólti síðani stovningarárið 1958, so byrjaði eitt annað felag at geva teimum harða kapping frá síðst í 70 árunum og 20 ár fram.

VÍF bygdi eitt gott lið upp hesi árini at kappast ímóti liðnum hjá Kyndli, og hetta gav eisini úrslit hjá vestmenningum. Frá 1980 til 1987 vann VÍF seks meistaraheiti, meðan Kyndil vann tvey, og nú var kappingin ímillum Kyndil og VÍF vorðin nógv harðari. Hetta vóru risarnir í føroyskum manshondbólti.

Hesi árini vóru eisini færri og færri Losju-limir at finna á kyndilsliðnum, og tá ið Kyndil so vann meistaraheitið aftur í 1988, eftir at VÍF hevði vunnið tað síðsta trý árini, var hetta fyrstu ferð í søguni hjá felagnum, at eingin limur í Losjuni var á liðnum. Nú hevði Kyndil endaliga flutt seg frá at vera partur av avhaldsfelagnum Losjuni til at vera eitt hondbóltsfelag burturav.

### Fantastiskur dystur

Frá 1988 vann Kyndil meistaraheitið seks ár á rað, og hesi árini var tað aftur Kyndil, sum setti dagsskránna í føroyskum manshondbólti. Teir vóru rættiliga nógv tað besta liðið, men í 1993 bleivu teir aftur steðgaðir av vestmenningum.

Kyndil vann aftur í bæði 1994 og 1996, men so steðgaði fullkomiliga upp hjá besta mansliðnum hjá Kyndli. Nú tók VÍF yvir fram til 1998, men í 1999 endaði ein long sigursrøð hjá Kyndli og VÍF. Síðstu 20 árini høvdu tey vunnið 10 meistaraheiti hvør, men í 1999 eydnaðist strandingum at enda á ovastu rók.

Kyndil var eisini steðgað rættiliga upp við at vinna meistaraheiti, og menninir máttu bíða í átta ár, áðrenn tað aftur eydnaðist teimum at vinna. Hesi árini høvdu kvinnurnar í felagnum tó bygt eitt gott lið upp. Hetta gjørdi, at Kyndil fyri fyrstu í søguni megnaði at vinna tvey meistaraheiti á rað hjá kvinnunum. Hetta var í 1998 og 1999.

Í 2004 bragdaði so endiliga aftur hjá besta mansliðnum, tá teir vunnu meistaraheitið í síðsta dystinum á árinum. Hesin dysturin man helst vera ein tann mest spennandi í føroyskum hondbólti nakrantíð.

Kyndil tók ímóti VÍF í síðsta dystinum, og undan dystinum var Kyndil eitt stig frammanfyri. Kyndil tóktist eisini hava beina kós ímóti meistaraheitinum, men síðstu løtuna tveittu teir mest sum alt á gólvið ímóti vestmenningum. Tá trettan sekund vóru eftir, sendi Ingi Olsen eitt brotskast í netið, og nú var VÍF brádliga á odda við einum máli, og meistaraheitið var í Vestmanna.

Kyndil gjørdi tó eina síðstu roynd. Teir fóru í eitt skjótt álop, og tá tvey sekund vóru eftir fingu teir brotskast. Jónleif Sólsker var settur at skóta, og hann var tryggur úr sjey metrum, og so vann Kyndil meistaraheitið fyri fyrstu ferð í átta ár.



*Her standa fýra av gomlu kempunum í Kyndli og fylgja spentir við í móttøkuni fríggjadagin. Teir eru Hannis Jacobsen, Anfinn Rubek Nielsen, Sverri Jacobsen og Heðin Mikkelsen.*

### Mest vinnandi liðið

Kyndil hevur vunnið eitt meistaraheiti síðani fantastiska kappingarárið í 2004. Hetta var í fjør, tá teir vunnu finaluna ímóti VÍF. Í ár er Kyndil aftur í finaluni í bestu mansdeildini, har teir enn einaferð møta erkafíggindunum úr Vestmanna, og um tvær vikur vita vit, hvat av hesum liðunum vinnur meistaraheitið í 2007.

Annars er at siga, at Kyndil er nógv tað mest vinnandi liðið í føroyskum manshondbólti. Teir hava vunnið heili 28 meistaraheiti. Teimum á baki kemur VÍF við 19. Hjá kvinnunum hevur hevur Kyndil vunnið næstflest meistaraheiti saman við Søljuni, nevniliga fimm. Her er langt upp til Neistan, sum hevur vunnið heili 36 meistaraheiti.

# Hevur hugna sær

**Suni Merkisstein hevur roynt at fingið alt við um søguna hjá Kyndli. Sjálvt um bókin er fleiri enn 700 blaðsíður, so hevur hann slett ikki følt hetta strævið. – Eg havi hugna mær við hesi bókini**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Høvundurin, Suni Merkisstein, signeraði fleiri bøkur, sum blivu seldar fríggjadagin. Her signerar hann bókina hjá einum av stovnarunum hjá Kyndli, Torbjørn Mikkelsen.*

Niels Nattestad, vanliga kallaður Natte, var tann fyrsti, sum tók orðið, tá almenn móttøka fyri nýggju kyndilsbókini hjá Suna Merkisstein, Bjartur lýsir Kyndilslogin, var í Miðlahúsinum fríggjadagin.

Nógv fólk var komið saman at taka ímóti nýggju bókina, og tá ið Natte hevði sagt nøkur orð, reisteist sjálvur rithøvundurin, Suni Merkisstein. Hann fortaldi eitt sindur um søguna hjá Kyndli og um arbeiði við bókini.

Eftir móttøkuna fekk Sosialurin orðið á høvundan.

### Lagt dent á fyrstu árini

Suni Merkisstein hevur dekkað mest sum alla 50 ára søguna sera væl, og hann sigur seg eisini hava hugsað, at bókin møguliga fór at blíva ov long.

- Tað vóru tíðir, har eg hugsaði, at bókin var ov stór. Kyndil hevur tó eina størri søgu enn hini feløgini, og teir hava eisini ómetaliga gott yvirlit yvir øll hagtølini, so har var nógv at skriva um.

Ofta standa nýggju minnini nærri í huganum hjá fólki, og tí valdi Suni at leggja stóran dent á fyrstu 25 árini.

- Eg havi lagt serligan dent á fyrstu 25 árini hjá felagnum í bókini. Her vóru ikki serliga nógvir dystir leiktir, og tí havi eg mest sum tikið dyst fyri dyst. Eg helt tað eisini vera týdningarmikið at dekka tað gamla, tí at hetta minnast fólk ikki so væl. Hetta vekir vónandi fram góð og gomul minnir hjá lesarum.

### Glaður fyri samstarvið

Suni byrjaði uppá arbeiði við hesum stóra verki seint í 2005, so arbeiði hevur staðið uppá í nærum hálvtannað ár. Hann sigur seg tó ongantíð hava kett seg. Hinvegin hevur hann hugnað sær við arbeiðnum.

- Eg føldi hetta ongantíð at vera strævið. Eg havi hugna mær í tíðini, eg havi siti og arbeitt við bókini. Tað var heldur ikki ringt at fáa upplýsingar til vega, tí eg kom so at siga til búgvið borð. Alt tilfarið var klárt, so eg skuldi bara fara í gongd.

Suni var sum so liðugur at skriva alt tilfarið í november, og síðani tá hevur hann arbeitt við at fáa alt tað síðsta uppá pláss. Her hevur hann fingið góða hjálp frá serliga Niels Nattestad og Annsy Høghamar.

- Eingin ivi er um, at hjálpin frá Annsy og Natta hevur munað væl. M.a. vildu tey ikki útlevera gerðarbókurnar hjá Kyndli, men í staðin kopieraðu tey allar síðurnar til mín. Tað hevur eisini verið stuttligt at arbeiða saman við teimum, og nú eri eg bara glaður um, at bókin endiliga er liðug, segði Suni at enda.